## DAGSINS MEINING

# Okkara bestu umboðsmenn

Farna vikuskiftið vísti veruliga, hvussu savnandi føroyskur tónleikur er. Á Hotel Føroyum og í Norðurlandahúsinum savnaðust fleiri túsund fólk fyri at uppliva nakað av tí besta innan føroyskan tónleik. Í Norðurlandahúsinum spældu Eivør, Lena og Guðrun fyri útseldum hølum tríggjar konsertir á rað. Meðan Hotel Føroyar var á tremur við fólki til tónleikafagnaðin Planet Awards. Bæði tiltøkini savnaðu fólk, ið høvdu tokkan til tónleikin til felags.

Tónleikur er eitt heilt egið mál, ið talar sera sterkt til okkara. Hetta eru miðlarnir eisini farnir at leggja merki til, og plássið, ið tónleikalívið fær bæði á alnet-, í prentaðu- og loftmiðlum er alsamt vaksandi. Føroysku fjølmiðlarnir hava fingið ein virknan leiklut í tónleikalívinum. Hetta verður gjørt við stuðuli til eitt nú festivalarnar, men eisini við at verða beinleiðis fyriskipari av tiltøkum. Bæði í Norðurlandahúsinum og á Hotel Føroyum vóru tað fjølmiðlar, ið skipaðu fyri.

Tað var eisini serliga gleðiligt at síggja, hvussu virknan leiklut Kringvarpið hevði hetta vikuskiftið. Leygarkvøldið sendi manningin í Studio Pegasus beinleiðis av Hotel Föroyum, og sunnukvøldið varpaði útvarpið frá konsertini í Norðurlandahúsinum. Hetta gav øllum føroyingum høvi at sleppa við á hesi forkunnugu tiltøk. Men eisini skrivandi miðlarnir vóru væl umboðaðir.

Tað skerst ikki burtur, at føroyskur tónleikur er á eini aldu, við nøvnum sum Teituri, Eivør, Týr, Lenu og Guðrun, ið royna seg uttanlanda. Her er Eivør í løtuni ein sonn sólskinssøga, hon vann Planetina sum besta songkvinna leygarkvøldið, spældi herfyri í einum fyltum Mozart sali í Wien, og so er hon í uppskoti til seks av teimum tólv heiðurslønunum á Danish Folk Music Awards. Tað er eingin ivi um, at føroysku tónleikararnir eru okkara bestu umboðsmenn í útheiminum.

Útlendsku gestirnir á Planet Awards viðmerktu um høga støðið á føroyskum tónleiki. Serliga var tað bólkurin, ið vann heiðurin besti føroyski bólkur á Planet Awards, 200, ið sannførdi tónleikararnar úr Nephew, D.A.D. og Johnny Deluxe. Men eisini GBOB vinnararnir úr Marius fingu rósur. Jesper Binzer úr D.A.D, varð somuleiðis so bergtikn av fløguni hjá Deja Vu, at hann ognaði sær hana. Tillukku til allar vinnararnar og eydnuynski til tónleikin í Føroyum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Svar til Marius Dam, viðvíkjandi fyribyrging av fuglakrími

**HANS PAULI STRØM**
Landsstýrismaður



Í bløðunum herfyri spyr Marius Dam í opnum brævi undirritaða sera viðkomandi spurningin, um eg ætli at koma við tilmæli um, hvussu føroyingar skulu bera seg at fyri at fyribyrgja fuglakrími og setir í hesum sambandi 7 konkretar spurningar til mín.

1. Hvussu við heimafugli?
2. Hvussu við flytifugli?
3. Hvussu við fuglaveiði?
4. Hvussu við innflutningi av flogfenaði (deyðum / livandi)
5. Hvussu skulu føroyinga fyrihalda seg?
6. Hvørji eru symptomini uppá sjúkuna og hvussu skal berast at, um illgruni er um sjúkuna
7. Hvørjir viðgerðarmøguleikar eru?

Landsstýrismaðurin tekur fuglakrím og serliga vandan fyri eini møguligari influensu heimfarsótt (ið smittar frá fólki til fólk) í størsta álvara. Tí er longu eitt størri arbeiði sett í gongd fyri at tryggja føroyingum tað neyðuga koppingarevni, ið er tað týdningarmiklasta í eini tilbúgvingarætlan. Sum kunnugt, havi eg eisini sett ein arbeiðsbólk, ið júst er farin til verka fyri at gera eina heilsutilbúgvingarætlan í sambandi við eina møguliga influensu heimsfarsótt. Ein tílík ætlan vil tó eisini taka atlit til tilburðir, har ið menniskju verða smittaði beinleiðis av fugli. Hetta svarar til tað, ið alheimsstovnurin WHO nevnir fyri "Pandemic alert period". Hetta kemur við í tað uppskotið, ið arbeiðsbólkurin skal gera.

Tann tilbúgvingarætlan, ið bólkurin skal gera, skal kunna nýtast, óansæð um tann næsta influensu heimsfarsóttin upprunaliga kemur frá fugli, grísi, hesti ella onkrum øðrum djóri. Vit vita nevnliga ikki, hvar ein møgulig komandi influensuheimsfarsótt upprunaliga vil koma frá, men í løtuni er størst møguleiki at tað kemur frá flogfenaði.

Veterinermyndugleikin í Føroyum luttekur ikki í fyrrnevndu heilsutilbúgvingarætlan og ger tað heldur ikki í okkara grannalondum. Í Danmark til dømis er eisini eitt arbeiði sett í verk fyri gera ein tílíka tilbúgvingarætlan, og har luttekur ei heldur nakar frá veterinermyndugleikunum.

Hetta merkir tó ikki, at veterinermyndugleikarnir ikki gera sínar ætlanir, í.s.v. t.d. fuglakrím. Eg eri vitandi um, at Landsdjóralæknin arbeiðir á teirra øki við at seta eina kunngerð í gildi um at berja niður fuglakrím (hjá fugli) í Føroyum, um tað gerst neyðugt, og um hvussu fólk skulu bera seg at viðvíkjandi handfaring av flogfenaði. Eg vil tí mæla til, at tú setir landsdjórlæknanum fimm teir fyrstu spurningarnar, tí tað er hann, ið hevur størst vitan um fyribyrging av sjúku hjá fugli og handfaring av fugli.

Eg skal tó svara báðum teimum seinastu spurningunum (spurningi 6 og 7).

Tað skal tó nevnast, at snýr tað seg um sjúkueyðkenni (symptomir) við beinkrími hjá fuglum og viðgerð av fuglum, mæli eg til, at eisini hesir spurningarnir verða settir landsdjóralæknanum. Verður hugsað um sjúkueyðkenni hjá fólki, smittað við beinkími frá fuglum, so eru tey hesi:

Vanlig sjúkueyðkenni samsvarandi beinkrími (knappliga íkomin sjúka við fepri yvir 38, hosti, sjúkueyðkenni frá andarleið og bein/vøddapína) umframt eygnabruni og lungnabruni, ið er íkomin í londum, har fuglakrím er staðfest.

Serliga skal ein vera varugur við hesi sjúkueyðkenni, um ein innan 7 dagar hevur ferðast í einum øki, har ið fuglakrím er staðfest og verið í sambandi við sjúk ella deyð djór, ið kunnu vera smittað við fuglakrími.

Spurningurin um hvussu ið berast skal at, um illgruni er um sjúkuna, veldst um eina meting, ið verður lýst í áðurnevndu tilbúgvingarætlani fyri eini møguligari influensu heimsfarsótt, ið arbeiðsbólkurin kemur at gera og handa landsstýrismanninum í seinasta lagi 1. juni.

Viðvíkjandi viðgerð av fólki, ið eru smittaði við fuglainfluenza H5N1-virus, er tað serliga heiligvágurin Oseltamivir, ið kann minka um møguleikan, at virusið nørir seg og betrar um møguleikan at yvirliva sjúkuna. Viðgerðin verður eisini lýst nærri í áðurnevndi tilbúgvingarætlanini fyri influensu heimsfarsótt.

At enda vil eg vísa til heimasíðuna hjá Statens Serum Institut HYPERLINK http://www.ssi.dk www.ssi.dk, har teir mest vanligu spurningarnir og svarini um fuglainfluensu finnast.

# Nei nei, Bjarni Djurholm

**RANDI Í JÓGVANSTOVU**
Leirvík



Nú bert tú teg at sum ein »gavstrikkur«.

Tvey samdøgur eftir at kommunustýrið í Leirvík einmælt hevur samtykt, at vit vilja hava ein tunnil oman fyri Tavuna, sendir tú tínar menn norður til Leirvíkar at máta upp fyri einki minni enn tveir vegir oman fyri bygdina.

Okkara størsta og besta aktiv sum bygd í dag er tað frálíka byggilendi, vit hava at bjóða okkara framtíðar borgarum.

Ein vegur oman fyri bygdina fer karvandi ígjøgnum allar framtíðar útstykkingar. Tá kavin og kuldin kemur, fer ferðslan at koma sendandi gjøgnum bygdina, tí tað verður alt ov trupult at koyra so ovarliga.

Nei Bjarni Djurholm, vit góðtaka ikki, at tú geldir Leirvíkar bygd og framtíð okkara.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.